## Súni skal selja seg

Súni Olsen hevur lagt trýst á seg sjálvan undan landsdystinum hjá Føroyum móti Estlandi komandi mikukvøld. Við danska bold.dk sigur føroyski landsliðsspælarin, at hetta vónandi er eitt gott forum at prógva sítt virði fyri ein komandi arbeiðsgevara. Viborg, sum Súni spældi við í vár, flutti niður úr donsku superliguni, og Súni hevur gjørt av, at hann ikki leingir sáttmálan við felagið.



## Gullfuglurin spældi fyrsta landsdystin

Tarik Elyonussi, sum spælir í norska Fredrikstad er á ynskilistanum hjá fleiri europiskum stórfeløgum. Mikukvøldið spældi hann fyri fyrstu ferð á norska A-landsliðnum, og áhugin er neyvan minni eftir hetta. Tarik brúkti bara fýra minuttir á vøllinum, áðrenn hann í seinna hálvleiki javnaði til 1-1 í landsdystinum hjá Noreg móti Uruguay. Uruguay kom tó upp á 2-1, men við beinleiðis frísparki tryggjaði John Arne Riise Noreg javnnleikin.



*Toftamenn vóru tolnir, men í evstu løtu mistu teir stig, tá B36 vitjaði mikukvøldið*

*Mynd: Álvur*

B68-B36 0-1 (0-1):

# B36 mátti arbeiða hart

B68

B36

**B68 helt leingi B36 frá málmøguleikum, men í evstu løtu eydnaðist tað Bergi Midjord at vinna B36 øll stigini til Havnar**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Uppflytararnir úr B68 hava havt eitt gott kappingarár higartil í ár, og á heimavølli hava teir verið sera sterkir. Tað var tískil ikki ein lætt uppgáva, sum bíðaði B36 mikukvøldið. B36 hevur eisini havt trupult við at skapa málmøguleikar í ár, og hetta kundi koma at kosta á Toftum, har B68 bara hevur latið trý mál inn higartil í ár.

### Tolið heimalið

B68 leikti ein sera góðan dyst ímóti ÍF um vikuskiftið, og vónirnar til hendan heimadystin mundu vera góðar. Tað var tó ikki eitt B68-lið, sum eyðsæð vildi nakað frameftir vøllinum, ið kom á vøllin. B68 legði seg langt aftur á vøllin, og B36 fekk nógv pláss at leika á. Senegalesararnir hjá B68 vístu tó góðan stríðsvilja, og góði bóltførleiki og kvikleiki teirra lótu altíð ein vanda vera til staðar hjá B36.

B36-spælið endaði tó sjáldan við vandamiklum støðum, og tættari enn okkurt langskot komu teir ikki. B68 lá framvið, men eiheldur teir megnaðu at hótta B36-spælið so mikið, at teir vóru tætt við at leggja seg á odda.

B36 vísti betra spælið í fyrra hálvleiki, men eitt tolið og passivt heimalið helt B36 frá vandastøðunum. Mesta spælið fór fram í einum bóltbardaga á miðjuni, og hálvleiksstøðan gjørdist væl hóskandi 0-0.

### Trýst á báðar endar

Tað var eitt meira vakið og framrættað B36-lið, sum kom á vøllin í seinna hálvleiki. B36 spældi rættiliga beinleiðis á málið, meðan B68 ikki menti sær nógv frameftir vøllinum. B36 hevði eitt stórt trýst á B68-málið stóran part av seinna hálvleiki, men úrslitaleysu álopini høvdu hug at møða B36-leikararnar so mikið, at B68 ímóti endanum fekk eitt gott yvirtak og nærkaðust B36-málinum í stórum. Neyvleikin var tó ikki til staðar hjá nøkrum liði, og málmenninir høvdu ikki nakran sváran arbeiðsdag. B68 var tó ofta vandamikið í deyðbóltsstøðum, men langar avleveringar, sum hevur verið ein stór hjálp hjá B68 í ár, var lítil hjálp hendan dagin.

Hóast liðini høvdu trupult við at skapa málmøguleikar í regninum á Svangaskarði, so skuldi tað vísa seg, at eitt sigursgevandi mál skuldi falla. B68 misti bóltin í uppspælinum, og B36 fór í mótálop. Uppspælið endaði í vinstru síðu, har eitt innlegg varð sent til Berg Midjord, sum ikki sveik einsamallur frammanfyri málinum og skoraði til endaliga úrslitið, 1-0. Ein B68-verjuleikari stóð tó frammanfyri Berg, men heldur ósannførandi kiksaði hann bóltin, sum hann á einum vanligum degi hevði ruddað burtur í svøvni.

Trýstið hjá B36 gav úrslit hóast alt, og hetta heldur teir framvegis livandi í oddastríðnum, har teir nú hava 16 stig á 3. plássi. B68 kom nú niður á jørðina aftur, og verður verandi mitt í deildini við 11 stigum.

## Væl skipað lið

Venjarin hjá B68, Bill McLeod Jacobsen, hevur rósandi orð til mótstøðuliðið. Vit spurdu hann, hvussu tað ber til, at spælið hjá B68 er viknað so nógv síðan teir tríggjar dagar fyri dystin vístu frálíkt spæl ímóti ÍF.

- B36 spælir annarleiðis enn ÍF. B36 hevði latið fimm mál inn í átta dystum, og hava sera sterka verju. Teir eru ikki so sterkir har frammi, men teir eru ógvuliga væl skipaðir, segði Bill eftir dystin.

- Tað bleiv til ov nógv einmansavrik, har ein og ein roynir sjálvur. Hetta tekur langa tíð, har tað hinvegin er nógv lættari at spæla bóltin. Hetta gongur nógv skjótari, staðfestir Bill.

Hann er ikki ónøgdur við gongdina higartil.

- Ein triðingur av kappingini er lokin, og hóast vit hava havt eitt skert lið, so eru 11 stig vunnin. Heldur gongdin fram, so er málsetningurin um at grunda seg í deildini rokkin, sigur Bill McLeod Jacobsen.

## Trýstið gav úrslit

Bergur Midjord, sigursharrin hjá B36, var sum vera man fegin um sigurin.

- Vit royna at trýsta høgt uppi á vøllinum allatíð, og so er tað bara heppið, at vit fáa málið. Tað loysti seg at trýsta, sigur Bergur, sum somuleiðis staðfestir, at málið fall eftir største málmøguleikan í dystinum.

Tit hava havt trupulleikar við at skora mál í ár. Er hetta nakað, ið tit tosa um?

- Ja, vit tosa eitt sindur um trupulleikan. Vit skapa altíð nakrar málmøguleikar, og so mugu vit bara royna at skora uppá teir. Men hetta er ein trupulleiki, og vit mugu bara vóna at tað fer at gangast betur,